# Gott kjak um ferðslutrygd

**Ráðstevnan um ferðslutrygd í Norðurlandahúsinum hósdagin 19. januar endaði við einum kjakfundi um hvussu ferðslutrygdin skal skipast í Føroyum. Fundarfólkið fekk høvi at seta spurningar og koma við uppskotum**

FERÐSLUTRYGD

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Panelið á kjakfundinum í Norðurlandahúsinum: Jón Kragesteen, leiðari á Ferðslutrygd, Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki, Sunrid Traðará, politistur, og Rúna Sivertsen, formaður í Ferðslutrygd*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Ferðsla og ferðslutrygd er nakað, sum hevur við okkum øll at gera. Um vit so eru til gongu ella koyra í akførum, er vit ein partur av ferðsluni. Tí er hetta eitt sera týdningarmikið evni, sum eisini hevur stóran áhuga millum fólk. Ikki minst tá hugsað verður um hvussu álvarsligar fylgjur ferðsluvanlukkur hava fyri tær familjur og avvarðandi, sum verða meint rakt.

Sum seinasta punkt á ráðstevnuni, ið Ferðslutrygd skipaði fyri í Norðurlandahúsinum hósdagin 19. januar, var eitt áhugavert kjak á skránni, har fundarfólkið fekk høvi at seta teimum fimm persónunum í panelinum spurningar og koma við uppskotum um tryggari ferðslu. Í panelinum sótu: Jón Kragesteen, leiðari á Ferðslutrygd, Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki, Sunrid Traðará, politistur, og Rúna Sivertsen, formaður í Ferðslutrygd.

Nógvir spurningar vóru settir og svaraðir, og eisini komu nógv uppskot fram. Fyrst setti orðstýrarin, Óluva Zachariassen, spurningin til landsstýrismannin og leiðaran fyri Ferðslutrygd um hvussu langt eru vit komin við 0-hugsjónini. Jón Kragesteen svaraði, at hann hevði latið landsstýrismanninum álitið um 0-hugsjónina í 2003, og Bjarni Djurholm segði, at allar broytingar í ferðslulógini verða gjørdar við 0-hugsjónini sum grundarlag, og eftir ætlan verður skal hetta lógarfestast, soleiðis at tey skiftandi landsstýrini í framtíðini eru bundin til at arbeiða víðari við 0-hugsjónini.

Annars kom nógv sera áhugavert fram á kjakfundinum, sum t.d. at øll skulu læra seg at nýta trygdarbelti altíð, at politiið fær arbeiðsumstøður at brúka meira orku upp á ferðsluna og kunna geva bøtur á staðnum, fyri at sleppa undan ov nógvum pappírsarbeiði.

Onkur samanbar ferðslutrygd og alkoholmisbrúk. Fólk sum ikki klára at handfara alkohol verða send í viðgerð, og tað sama kundi verið gjørt við bilførarar, sum ikki duga at handfara eitt akfar. Teir skuldu havt møguleika at farið í viðgerð fyri at læra seg at koyra.

Eisini var komið inn á hvussu vandamikið tað t.d er, tá stórir lastbilar fult lessaðir koyra í samband við størri arbeiðir. Fyri at fáa so nógv burturúr sum gjørligt, verður koyrt við alt ov nógvari ferð til stóran vanda fyri aðra ferðslu.

Eisini varð tosað um klippikortskipanina, sum er komin í gildi í Danmark við sera góðum úrsliti.

Øll vóru samd um, at tað skulu hugburðsbroytingar til um vit skulu koma víðari við 0-hugsjónini.

# Fleiri doyggja av yvirvekt enn í hungri

**Fríggjakvøldið 13. januar skipaði Herbalife í Føroyum fyri almennum fundi í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Har Gudrun Sigfusson, sum er útbúgvin kostráðgevi, helt fyrilestur um sunnan kost og tað at lætna**

HEILSA

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Gudrun Sigfusson, kostráðgevi, helt almennan fyrilestur um sunnan kost og tað lætna*



*Herbalife umboðsfólkini Willi Olsen (v.m.) og Kirsten Jacobsen (h.m.) saman við Gudrun Sigfusson, kostráðgeva*

Vit hava so nógvan skund, alt skal ganga so skjótt fyri seg, og vit finna lættar loysnir, so sum t.d. at eta meðan vit arbeiða og konsentrera okkum um alt annað. Vit fóðra okkum við fast-food, sum bara ger okkum feit, samstundis sum vit kropsliga eru minni virkin, bæði til arbeiðis og heima. Og fyri at klára tað dagliga trýstið, stíva vit okkum av við onkrum stimbrandi, sum í longdini ger, at vit gerast sjúk og noyðast at taka heilivág, sum ofta hevur hjáárin við sær, segði Gudrum Sigfusson á almennum fundi í Miðlahúsinum seinasta fríggjakvøld.

Fundurin byrjaði við at Willi Olsen í Hósvík, ið er ein av umboðsmonnunum hjá Herbalife í Føroyum, beyð øllum at vera vælkomin og segði frá um Herbalife, og hvat tað stendur fyri. Síðan søgdu nakrir brúkarar frá sínum royndum við Herbalife, og fólk fingu høvi at royna ymiskar drykkir.

Eftir tað helt Gudrun Sigfusson, sum er útbúgvin tannlækni og kostráðgevi fyrilestur um sunnan kost og tað lætna.

Hon tosaði m.a. um vælferðarsjúkur og segði, at sambært heimsheilsustovninum WHO doyggja fleiri fólk í vesturheiminum av yvirvekt og fiti enn tað doyggja í hungri í restini av heiminum. Sjey út av tíggju deyðsorsøkum í vesturheiminum standast av hjarta- og æðrasjúkum, krabbameini, heilabløðing og diabetes typa2, ella sum hon segði, lívsstílsdiabetes. 50 prosent av hesum deyðsorsøkum kundu verið fyribyrgdar við broyttum matvanum og broyttum lívsstíli. Eitt nú erektiónstrupuleikar og vantandi evni at gerast við barn, eru ofta orsakað av vantandi ernering.

Eisini er tað mangan so, at húsdýr og onnur dýr fáa sunnari kost enn vit menniskju fáa, segði Gudrun Sigfusson.

Herbalife er ein heilsufyritøka, sum varð stovnað í 1980 í USA. Fyritøkan leggur serligan dent á at upplýsa og selja heilsugóð produkt, ið hjálpa fólki at lætna við at eta røttu føðina, samstundis sum tey altíð eru mett og væl fyri. Produktini eru ikki at sammeta við medisin ella nakað grøðandi, men bert optimal og avbalanserað føði. Louis Ignarro Phd., ið er ein av granskarunum hjá Herbalife, vann í 1998 eina Nobel virðisløn innan sálarfrøði og medisin. Grundað á hansara gransking er millum annað kenda produktið Viagra framleitt.

Tað vóru Kirsten Jacobsen og Willi Olsen, umboðsfólk hjá Herbalife í Føroyum, sum stóðu fyri tiltakinum, ið var alment. Leygardagin og sunnudagin vóru skeið hildin fyri áhugaðum, sum vildu hava meira at vita um vørurnar hjá Herbalife og royna tær. Fleiri upplýsingar á www.herbalife.com